Dátueftirlitið

Fylgiskjal 2

Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 24. februar 2020
J.nr: 20/00026-3
Tykkara skriv:
Málsviðgeri:

**Viðvíkjandi.: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m.**

Dátueftirlitið hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m.

Dátueftirlitið hevur viðmerkingar til uppskotið.

Landsstýrismaðurin fær við uppskotinum heimild til at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna. Hendan heimild skal nýtast til at geva løgregluni atgongd.

Dátueftirlitið skal gera vart við, at beinleiðis atgongd til eina skipan økir um váðan fyri trygdarbroti. Mælt verður til, at atgongdin hjá løgregluni til vápnaskránna verður nágreinað. Millum annað kann ásetast, hvussu atgongdin hjá politinum verður skipað, hvat politiið fær atgongd til, nær atgongdin kann nýtast, og hvat atgongdin er avmarkað til.

Mælt verður til, at nøktandi trygdartiltøk verða sett í gildi og í verk, sum forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd til persónsupplýsingarnar, ella at tær verða misnýttar. Trygdartiltøkini skulu vera skjalfest og viðvíkja fyriskipanarligari, tekniskari og fysiskari trygd.

Sambært persónsupplýsingalógini skal viðgerðin av persónsupplýsingum verða skipað sambært nágreiniligum mannagongdum, sum greitt áseta, hvussu persónsupplýsingar verða handfarnar í sambandi við viðgerðina.

Sambært § 7, stk. 1, í persónsupplýsingalógin[1] er lógin einans galdandi fyri almennar dátuábyrgdarar, sum eru undir myndugleika heimastýrisins. Tá ið løgreglan er ein danskur myndugleiki, er persónsupplýsingalógin ikki galdandi fyri løgregluna. Dátueftirlitið hevur tí ikki møguleika at hava eftirlit við løgregluni.

Vegna Dátueftirlitið

Hjørleivur Sørensen

[1] Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004.